

*Svanna hyggur at, meðan Maria tólvtrar slíðraband. Eisini á henda hátt lærdu næmingarnir nakað um bæði ull og grind*



*Pól Jóhannes er ein av næmingunum á skúlanum. Tá myndin var tikin sprakk hann á føtur og spurdi, um eg (blaðkv.) ikki eisini vildi hava pinnamat*



*Rakse drenge grind at dræbe... Tá niðurlagið kom, lá væl fyri hjá Fríðu og Eydnu at kvøða*



*Skúlaleiðarin Óli Jákup Joensen bjóðaði Súsan í Jákupsstovu ein dans*



*...og her eru tað, Sunniva, Olivia og Beinta, sum svinga so hjartans glaðar*



*Hvør skal næsti leikur verða? Theodor, Mikkjal og Tønnes í djúpum tonkum við talvborðið, sum altíð stendur frammi í høllini*

# Í okkara skúla skulu børni

**Tað var lív í á Norðskála-Oyrar skúla herfyri, tá evnisvikan, tey høvdu havt um ull og grind, endaði, og listaverkini, tey høvdu gjørt úr ull, vórðu sýnd fram í høllini á skúlanum. Eisini varð borðreitt við pinnamati við grind, spiki, eplum og turrum fiski**

EVNISVIKA
*Orð og myndir:*
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Hesaferð skuldi evnisvikan á Norðskála - Oyrar skúla snúgva seg um eitthvørt, sum hevur bæði við myrku tíðina og økið har um leiðir at gera.

Tey gjørdu av, at evnið skuldi verða grind og ull. Grindavísan gongur fyri seg millum Hvalvík og Oyrar, so tað var upplagt at velja hana sum høvuðsevnið, ið alt arbeiðið skuldi ganga út frá.

Fyri at røkka øllum tí, sum ætlanin var at fáa burtuúr, varð neyðugt at biðja um hjálp frá læraraskúlanum. Og tað var jú eitt óført hugskot, tí á henda hátt fingu læraraskúlanæmingarnir høvið til nakrar veruliga mennandi og gevandi starvsroyndardagar.

Við leiðslu av Súsan í Jákupsstovu, sum er ein meistari , tá tað kemur til at fáast við ull, gjørdu børnini, saman við næmingum frá læraraskúlanum, tey vakrastu listaverk, tú kanst hugsa tær.

Í skúlanum hava tey leingi ynskt at prýða høllina, so hugskotið frá Súsan, um at gera myndateppir úr tøvdari ull, var júst tað rætta og gjørdi dreymin til veruleika.

Grindavísan lýsir væl grindadrápið, frá tí grindin verður funnin til hon verður býtt og skorin upp. Tá evnisvikan var av, vistu næmingarnir alt, sum var vert at vita um grind. Tey høvdu tá gjøgnum myndalist, og við at læra grindavísuna, lært um grind á ein hátt, sum gjørdi, at tey fingu nógv burturúr og síggja nú grind og grindadráp úr øllum sjónarhornum.

Eisini høvdu tey lært nógv um føroysku ullina, hvussu hon kann brúkast, bæði til brúkslutir, leikur og myndir.

Seinasta evnisdagin var framsýning, framførsla og dansur í høllini. Eisnini varð borðreitt við pinnamati við grind, spiki, turrum fiski og eplum. Eplini høvdu næmingarnir sjálvir velt og tikið upp.

## Stór mál

Saman við starvsfólkum sínum, hevur skúlaleiðarin, Óli Jákup Joensen, sett sær stól mál fyri Norðskála-Oyrar skúla.

– Vit vilja bera orð fyri at vera ein skúli, sum hevur børnini í miðdeplinum, og sum er til reiðar til framtíðina – alla tíðina, siga tey á heimasíðuni, www.sunda.fo

Skúlin hevur sum mál at geva næmingunum eitt virðisgrundarlag, har eitt nú stórur dentur verður lagdur á fólkaligheit, fyrilit og umsorgan.

– Á okkara matrikkulnummarið skulu børnini hava tað gott, sigur skúlaleiðarin.

Hann vísir á, at í dag eru tað nógv børn, sum hava tað so trupult.

– Men vit kunnu seta okkum fyri, at børnini skulu hava tað gott í skúlanum, kenna seg trygg og vita, at her eru vit góð við tey.

– Vit leggja eisini ábyrgdina yvir á næmingarnar sjálvar við at siga, at eingin næmingur skal taka lut í ella góðtaka at næmingar verða argaðir,



*Djóni hevur fingið upp á talerkin. Í langari røð standa øll hini og bíða eftir matinum, tey sjálvi hava verið við at gjørt til*